# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

### Føðingar

5. juli fingu Mariann Johansen og Uni Jacobsen, Tvøroyri, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 4000 gr.

14. juli fingu Hedvig Højgaard og Robert Waagstein og stóribeiggi Eyðun Højgaard Waagstein, Klaksvík ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4050 gr.

14. juli fingu Tóra Johansen og Sverri Eriksen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3750 gr.

14. juli fingu Sunniva og Ørvur Joensen, Saltangará, eina dóttur. Hon var 41 cm. long og vigaði 1675 gr.

15. juli fingu Eyðbjørg Skaalum, Hvalba og Hallur Augustinussen, Vágur ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 4050 gr.

15. juli fingu June og Eiler Langgaard, Toftir, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4400 gr.

15. juli fingu Karin Louisa og Óli Nicodemussen, Argir, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4150 gr.

15. juli fingu Bjarma Ivansdóttir Gærdbo og Poul Johan Arge, Velbastaður, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3700 gr.

16. juli fingu Alis og Hans Petur Joensen, Oyrareingir, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3230 gr.

18. juli fingu Marianna og Høgni Hansen, Fuglafjørður, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 2700 gr.

19. juli fingu Eydna Poulsen og Signar í Homrum, Streymnes, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3800 gr.

20. juli fingu Jonna Johansen og Andreas Poulsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 3750 gr.

21. juli fingu Poula og Kári Poulsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 49 cm. long og vigaði 3095 gr.

### Brúdleyp

Í dag, 23. juli kl. 16.00 giftast í Tvøroyrar kirkju, Rannvá Jacobsen, Tvøroyri og Rasmus Haugaard Jensen, Brønshøj. Veitslan verður fyri innbodnum í høllini í Trongisvági kl. 19.00.

Í dag, 23. juli kl. 15.00 giftast í Freerslev kirkju á Sælandi, Flóvin þór Næs úr Havn og Birgitte Kragh Nygaard úr Haslev. Brúdleypsadressan er Sørup Herregaard, Sørupvej 26, DK-4100 Ringsted.

Í dag, 23. juli kl. 18.00 giftast í Dómkirkjuni Jónrit Nielsen og Erling Dalsgaard, Tórshavn. Veitslan verður fyri innbodnum í hølunum hjá Havnar Róðrarfelag í Álakeri.

Í dag, 23. juli kl. 17.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík Eina Hansen og Kristian Eliasen. Veitslan verður fyri innbodnum í Skálanum kl. 19.00.

Í dag, 23. juli kl. 15.00 giftast í Hirtshals kirkju, Eilin Hentze og Dan-Kári Joensen, Skopun. Døgurði verður fyri innboðin. Tey, ið vilja gleðast saman við brúðarparinum eru vælkomin til Kathrinu og Dánial Joensen, Kærvej 35, Hirtshals, frá kl. 20.00.

Í dag, 23. juli kl. 17.00 giftast í Dómkirkjuni Joan Joensen, Tórshavn og Jens Jacob Nissen, Søborg. Veitsla verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum.

Í dag, 23. juli kl. 16.00 giftast í Sørvágs kirkju, Marian Skaalum, Sørvágur og Henrik Lundgren, Skovlunde. Dagurin verður hildin saman við innbodnum í Húsmøðrafelagshúsinum í Sørvági.

Í dag, 23. juli kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni, Herborg Líggjasardóttir Joensen, Tórshavn og Rúni Magnus Johannesen, Argir. Veitslan verður fyri innbodnum í HB-húsinum kl. 19.00.

## Sølvi Mortensen á Sandi 75 ár



Leygardagin 23. juli 2005 fyllir ein kendur sandingur 75 ár – pápi okkara Sølvi Mortensen. Pápin hevur í eitt mannaminni verið ein bygdarmynd á Sandi. Saman við svágrinum Carl Jóhan hevur pápin rikið handilin Eldhús, og mong munnu kenna blíða og lívliga handilsmannin, sum altíð er klárur at práta og skemta við fólk – ikki bert við dagligu kundarnar úr sandoynni, men eisini við mongu ferðafólkini, ið vitja handilin.

Pápin er sum seyðurin á Sandoynni – ikki stórur, men knáur. Tað ið hann velur at gera, gongur hann upp í við lív og sál, og tí er hann ein maður, ið setir spor eftir seg hjá teimum, ið hava við hann at gera.

Áðrenn tú sær hann kanst tú ofta hoyra hann langa leið, syngjandi. Sum í kvøld, tá íð hann kom av Sandi til okkara. Bilurin var nóg illa støðgaður úti á vegnum áðrenn vit hoyrdu heitu røddina á pápanum syngja »Gud er på tronen endnu«.

Sum ungur valdi pápin sjólívið. Róði í fleiri ár út í Grønlandi. Fór á skiparaskúla og førdi skip sum skipari og stýrimaður. Hann var ein fiskiklógv, og vildi fegin havt sjólívið sum sína lívsleið. Men tá ið vit børn komu, valdi pápin kortini at vera heima hjá okkum, og lívið sum handilsmaður í handlinum hjá verpápanum Jógvani á Eldhúsi.

Pápin hevur fyrst og fremst valt at liva fyri síni nærmastu, og fyri at tæna Gudi. Hann varð umvendur til trúgv sum ungur, og tók skjótt stig til at byggja Missiónshús á Sandi. Hann var við til at byggja húsið fyrst í 60-árunum, og var fyristøðumaður fram til fyri stuttum. Pápin er kendur sum lívligur og eldhugaður predikantur, sum altíð er fúsur at tala gudsorð bæði úti og heima. Altíð við tí góða og positiva gleði-boðskapinum – men ongantíð við peikifingrinum – tað liggur bara als ikki til pápan. Hann er kendur fyri at duga væl at syngja, og at seta lív í boðskapin við at syngja gamlar missiónssangir við síni sterku og kláru rødd. Pápin er ein maður man ikki kann lata vera við at dáma, og tí hevur hann eina ørgrynnu av góðum vinum runt um allar Føroyar – ikki minst innan heimamissiónina.

Pápin er sjáldsama lívsglaður maður. Hann elskar Føroyar og føroysku náttúruna, og er úti í bø og haga hvørja fríløtu, út til seyðin, ið hann passar á trimum træum. Pápin livir í núinum, gleðist um alt, er altíð positivur, og hugsar fyrst um at gleða onnur heldur enn seg sjálvan. Hann er ein sonn orkukelda, ið ongantíð situr hendur í favn. Altíð er hann fyrstur at hjálpa til.

Pápin er ikki bert nærverandi, men eisini nærlagdur og arbeiðssamur. Tað sæst aftur á húsunum, sum altíð eru væl málaði, og á snotuliga urtagarðinum, sum enn verður hildin væl – bedini eru lúkaði og grasvøllurin tætt sligin. Fólk ið koma framvið kunnu vissa seg um, at her býr ein glað sál við væl varðveittum barnalyndi. Tí mitt á plenuni hevur pápin nýliga sett eina hvíta standmynd í fullari støðd ið vísir ein fittan pissandi smádrong – og sjálvandi kemur vatn eisini úr standmyndini.

Fyri abbabørnini er hann besti vinurin, og tey elska hann, tí hann tekur tey við út í hagan og á trøðna at vitja ærina Marionnu. Og so fortelur hann søgur fortelur um sprutthol og gívrinarfót, syngur gamlar gloymdar sangir, og dansar ringi-ringi-rósu við teimum, so tey ýla av frøi. Men barnavinurin røkkur longri enn til síni egnu abbabørn. Sjálvt ókunnubørn frá fleiri tjóðum í Keypmannahavn fekk hann at dansa og syngja á føroyskum, tá vit búðu í Danmørk. Og flestu børn á Sandi hava gingið í sunnudagsskúla hjá honum, og munnu minnast livandi mannin, sum fúsur og stuttliga blásti lív í Guds orð.

Góði pápin. Vit royna at læra okkum at vera nærverandi mótvegis okkara nærmastu, at liva í núinum, at raðfesta tey ting í lívinum sum geva okkum innihald, bæði í heimalívinum og í arbeiðslívinum, at vera lívsglað og positiv, og vera nakað fyri onnur – og vit hava kent, at hetta er alt annað enn lætt. Men alt hetta er tú frá náttúrunar hond, og tí eru vit takksom fyri at vit – eins og hjúnafelagar okkara og børn okkara – kunnu hava teg sum okkara lýsandi fyrimynd. Takk fyri tín kærleika og tína góðsku pápin. Hjartaliga tillukku við føðingardegnum. Vónandi fáa vit lov at eiga teg hjá okkum í mong ár framyvir.

Føðingardagurin verður hildin hjá børnunum í Havn, saman við teimum nærmastu.

**Margret og Jan**

## Heilsan til Sølva Mortensen á 75 ára degnum



Nú leygardagin fyllir ein kendur heimasands/maður 75, Sølvi Mortensen.

Foreldrini hjá Sølva vóru Betty hjá Mads og Johan úr Hovi. Umframt Sølva áttu tey Jonu og Leif. Leif búsettist í Havn. Beiggarnir hjá Betty vóru Andreas og Pól Nikkels Hentze sum undirritaði kendi og bleiv giftur inn í teirra familju. Eg skal nevna her, at Svenning av Lofti hevur í bókini »Tað hendi umborð 1« frágreiðing um tilburð frá Andreasi tá ið teir vóru staddir í ringum veðri vestanúr Mykinesi.

Vit sum yngru eru, kenna Sølva sum ein fryntligan handilsmann úr Eldhúsi. Sølvi giftist við Tórdis sum er dóttir Jógvan og Gretu úr Eldhúsi. Sølvi og Tordis fingu tvey børn og tey búgva í Havn.

Sølvi fór sum so nógvir aðrir dreingir á Sandi til skips. Hann var eitt nú við Oyrasker, Mjóðanes, Elsu og meini við donskum skipi eisini. Seinni fór Sølvi uppá skiparaskúla og sum eg skilji, sigldi hann eisini sum skipari og bestimaður. Mær er fortalt, at Sølvi var sera avhildin skipari.

Seinast í 50-árunum fór Sølvi at hjálpa til í Eldhúsi hjá verfaðirnum og bleiv hann ein partur av handilslívinum á Sandi.

Í bestu ungdómsárunum mistu systkini mammuna sum einans var um 40 ára aldur vegna sjúku, og tað kom sjálvandi sera dátt við.

Sølvi er virkin innan Heimamissiónina. Hann hevur tikið sær av sunnudagsskúlanum nú í gott 47 ár og hevur annars verið stýrisformaður í Missiónshúsinum á Sandi. Jú, Sølvi man hava sátt nógv gott niður í børnini á Sandi.

Eitt sum eyðkennir Sølva, tá ið hann fer á talarastólin er hansara útstráling, – hettar at kunnu boða gleðiboðskapin – um tað komandi!

Sum skilst verða Sølvi og Tordis í Havn og ynskja vit tykkum, børnum og abbabørnum hjartaliga tillukku við degnum.

**t.**